| | | |
|---|---|---|
| **LD-Rundskriv** | Dato 02.12.2003 | Ár-nr. **2003-1** |
| Til **Stovnar hjá landinum** | FL j. nr. 8426-00-0011/2003 | Síða **1/1** |
| Heiti<br><br>**Rundskriv um samsýning til lesandi og skúlanæmingar í starvsvenjing** | | |

1. **Ásetingin fevnir um**

   Stovnar hjá landinum, ið hava lesandi og skúlanæmingar í starvi í styttri tíðarskeið.

2. **Samsýning**

   Lesandi fáa vanliga einki fyri at vera í starvsvenjing. Tó kann verða latið upp til 50% av byrjunarlønini í 3. lønarflokki í sáttmálanum millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. (sí pkt. 3)

   Skúlanæmingar kunnu í mesta lagi fáa kr. 1.000,- í samsýning, men hava ikki krav uppá samsýning.

3. **Treytir**

   Fyri at hava rætt til løn eigur tann lesandi at arbeiða fulla tíð og gera størri uppgávur fyri stovnin. Hesar uppgávur skulu vera ítøkiligar t.e. at tær koma stovninum eins væl og tí lesandi til góðar.

   Skúlanæmingar eiga at arbeiða fulla tíð og fáa smærri arbeiðsuppgávur runt á stovninum, ið svara til førleikan hjá einstaka næminginum.

4. **Gildiskoma**

   Hetta rundskrivið um samsýning til lesandi og skúlanæmingar í starvsvenjing kemur í gildi tann 1. januar 2004, og samstundis fer gamla skipanin, ásett í skrivi, dagfest 5. juli 1988, frá Føroya Landsstýri um samsýning til fólkaskúlanæmingar úr gildi.

**Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin, tann 2. desember 2003**

**Thomas Magnussen**